# Savna hugin í vøkru náttúruni

**GISTING** – Áhugin fyri at gista her hjá okkum er alsamt vaksandi. Tað vísir seg, at um fólk áður bara gistu eina nátt, velja tey nú ofta at taka eina aftrat, sigur eigarin av Gjáargarði, Eirik Suni Danielsen. – Vit kunnu í øllum førum ikki klaga.





**GÓÐ STARVSFÓLK**

*Eingin fyritøka uttan góð starvsfólk. Aftrat sær her á Gjáargarði, hevur Eirik Suni Danielsen gott fólk – vinstrumegin frá: konuna Tóru Tórgarð, Mainhild Harrysdóttir av Strondum og Annu Tórgarð, ið er bókhaldari*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Marknaðardagur í november

**Hóast virksemið í Gjáargarði mest snýr seg um ferðafólk og vitjandi gestir, hendir eisini annað við ávísum millumbilum.**
**Leygardagin 13. november verður nevniliga ein marknaðardagur hildin, her fólk fáa møguleika at selja tað tey hava hug til. Lítið er at ivast í, at okkurt, ið hevur samband við jólini, verður at síggja við borðini.**
**Fleiri hava longu boðað frá luttøku, men sagt verður kortini, at enn er pláss eftir til nøkur aftrat.**
**Tiltakið byrjar kl. 11 um morgunin og endar kl. 19.**

**» Vit eru í teirri hepnu støðuni, at ikki minni enn tveir vegir føra norður til okkara**

Snorri Brend

**Gjógv:** Hóast tað er kuldi og kavi uttanfyri, er sesongin fyri ferðavinnu ikki at enda komin her á Gjáargarði.

Her norðuri, í friðarligum og vøkrum umhvørvi við Gjógv, leita bæði føroysk og útlendsk ferðafólk sær í hópatali, – serliga um summarið, men eisini ein kaldan kavadag í oktober mánaði.

– Ja, tað er so, sigur Eirik Suni. – Her eru fólk allatíðina. So seint sum í morgun fór ein bólkur avstað hiðani.

Starvsfólkini á Gjáargarði eru nú farin í holt við tvey ting: At gera høvuðsreint eftir summarsesongina. Og at gera sínar fyrireikingar til vinnustevnuna FAROEXPO, sum er í Runavík hesa vikuna.

– Vit skulu gera mat til okkurt av tiltøkunum harúti. So tað skal eisini fyrireikast væl og virðiliga, slær Eirik Suni fast.

### 2012

Eins og so nógva aðrastaðni kring heimin, merkti føroyska ferðavinnan í fjør eina niðurgongd. Men nú er vend komin í.

Á Gjáargarði kunnu tey í øllum førum ikki klaga um júst farna summarið, sum var munandi betri enn í fjør. Nú er ein nærum komin aftur á sama støði sum í 2008.

– Eg haldi, at fólk so líðandi hava funnið útav, at vit á Gjáargarði eru til, og at okkara tilboð hóskar til